**Seinnapartin týsdagin kjósaði Reyði Krossur ársins 1. hjálpara. Peter J. Anderson, sum er 38 ára gamal, fekk heiðurin. Tvey uppskot vóru komin inn, og hin, sum var skotin upp var Tordur J. Niclasen av Eiði**



*Peter Anderson (t.v) gjørdist ársins 1. hjálpari. Reyði Krossur skipar fyri heiðrinum, og vóru tað í ár tvey uppskot komin inn til heiðurin. Hin var Tordur J. Niclasen (t.h)*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Peter er ársins 1. hjálpari

HEIÐUR
*Ingrid Bjarnastein*

Annað árið á rað hevur Reyði Krossur funnið ársins 1. hjálpara. Tveir persónar vóru uppskotið til heiðurin, og varð tað 38 ára gamli Peter J. Anderson, sum varð valdur.

Peter J. Anderson kom í november mánaði fram á eitt fólk, sum lá fram við Oyggjarvegnum, sum sá út til at verða lívleyst og ógvuliga kalt. Viðkomandi hevði ongan puls, og andadráttur var heldur ikki at merkja.

Peter setti seg í samband við vakthavandi í Mjørkadali, sum síðani setti seg í samband við 112, av tí, at onki fartelefonsamband var við Norðradal.

Við hjartamýking og eftirgjørdum andadrátti fekk Peter lív aftur í persónin, og hálvan tíma seinni var sjúkrabilur á staðnum.

Hin, sum var í uppskoti, var Tordur J. Niclasen av Eiði. Tordur var í mars mánaði í fjør til arbeiðis á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík, tá boð komu eftir honum, tí eitt av búfólkunum hevði sett eina appelsin í hálsin. Viðkomandi var bláur í andlitinum og um at kvalast.

Í frágreiðingini stendur at lesa: »Hann tók mannin úr stólin og legði hann tvørtur um seingina, so mikið langt út av seingjarkantinum, at tyngdarmegin hjálpti til. Tók so eitt fast tak um miðjuna á manninum og við einum dyggum trýsti inn á tinduna sprakk ein hálv appelsin úr hálsinum«. Og maðurin varð bjargaður.

Tað er Tryggingarfelagið, sum stuðlar ársins 1. hjálpara, og gjørdist tað, sum sagt hesuferð, Peter J. Anderson.

Bæði Peter Anderson og Tordur Niclasen fingu heiðursbræv frá Reyða Krossi, umframt, at ársins 1. hjálpari fekk eina pengaupphædd frá Tryggingarfelagnum.

# Ein sjúkrabilur til Streymoynna

**Av tí, at tveir sjúkrabilar hjá Landssjúkrahúsinum eru á verkstað, er bert ein sjúkrabilur, sum hoyrir til Landssjúkrahúsið tøkur í løtuni. Landssjúkrahúsið hevur tó lænt ein sjúkrabil úr Suðuroy, men sigur sjúkrahússtjórin, Poul Gert Hansen, at fólk skulu ikki kenna seg ótrygg**




*Av tí, at tveir av sjúkrabilunum,s um hoyra til Landssjúkrahúsið eru til umvælingar, so er bert ein sjúkrabilur tøkur. Landssjúkrahúsið hevur tískil lænt ein bil úr Suðuroynni*

SJÚKRABILAR
*Ingrid Bjarnastein*

Landssjúkrahúsið eigur níggju sjúkrabilar. Tríggir av teimum eru í ávísavist Vágunum, Eysturoynni og Sandoynni. Hinir seks hava heimstað á Landssjúkrahúsinum. Tríggir av teimum seks eru í so vánaligum standi, at teir koyra ikki, og tað vil siga, at bert tríggir sjúkrabilar eru tøkir hjá Landssjúkrahúsinum.

Í løtuni eru tveir av teimum trimum tøku sjúkrabilunum á verkstað, og er tí bert ein sjúkrabilur tøkur. Men Landssjúkrahúsið hevur tó lænt ein sjúkrabil úr Suðuroynni, og sigur sjúkrahússtjórin, Poul Gert Hansen, at fólk eiga ikki at kenna seg ótrygg hóast støðan er sum hon er.

– Vit hava nakrar nýggjar og nakrar gamlar sjúkrabilar. Teir sum ikki koyra longur eru millum 7 og 14 ára gamlir. Hinir, sum vit hava her í Havnini, eru eitt og trý ára gamlir, sigur Poul Gert Hansen.

## Keypa nýggjar

Ætlanin er annars í løtuni at keypa ein spildurnýggjan sjúkrabil. Ætlanirnar eru so væl á veg, at hann helst verður bílagdur fyrsta dagin. Og kanska ein sjúkrabilur afturat kemur seinni í ár, alt eftir, hvat er tøkt av peningi.

– Minst ein nýggjur sjúkrabilur skuldi verið keyptur um árið, og hetta er málið hjá okkum. Vit royna at seta pening av til hetta, men alt tekur tíð. Um alt skuldi verið optimalt, so høvdu vit havt fýra góðar bilar á Landssjúkrahúsinum, við tveimum børum, og ongin bilur skuldi verið eldri enn trý ár, sigur sjúkrahússtjórin.

Poul Gert Hansen leggur tó dent á, at fólk skulu ikki kenna seg ótrygg, hvat sjúkrabilum viðvíkur, tí Landssjúkrahúsið tryggjar sær neyðugu bilarnar.

– Nú er eisini fast samband til Vágarnar, so vit kunnu skjótt fáa tveir bilar haðani, um tað skuldi verið, sigur Poul Gert Hansen at enda.

# Bilar

Nr. 35 • hósdagur • 20. februar 2003 • 77. árg.

# Nýggjur Toyota Land Cruiser

**Toyota Land Cruiser GX 90 verður nú avloystur av einum nýggjum Land Cruiser. Bilurin, ið er designaður á evropeiska designsentrinum hjá Toyota í Suðurfraklandi, verður gjørdur í útgávum við trimum og fimm hurðum.**




*Olivar Danielsen sølumaður hjá Reyni Service við nýggja Toyota Land Cruiser 3,0 við common-rail turbodieselmotori*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Land Cruiser, ið hava nú verið gjørdir í meira enn 50 ár, eru nógv broyttir tey seinnu árini. Hesin nýggi bilurin, ið kemur at avloysa LandCruiser GX90, verður eins og forgangarin, ein ektaður "off roadari" við eins góðum eginleikum til at koyra á ósløttum undirlendi sum á vanliga koyrivegnum. Bilurin er útgjørdur við nógvari framkomnari tøkni til koyring, har tað er bratt og óframkomiligt. Hann hevur t.d. Hill-start Assist Control (HAC) og Downhill Assist Control (DAC) sum eru elektroniskar skipanir ið halda stýr á bilinum í brøttum undanbrekkum. Eisini hevur hann elektroniskt TORSEN miðdifferentiali. LandCruiser verður gjørdur í útgávum við 3 og 5 hurðum.

## Luksuspakkar

Tveir motorar eru at velja ímillum. Annar er ein 4 syl. 3,0 litur common-rail turbodiesel við 163 hk og hin er einV6 VVTi bensin við 249 hk og koyrir frá 0-100 km/t uppá 10 sek. Av trygdarútgerð kann nevnast at umframt airbag framman og í síðunum, hevur hann eisini gardinairbag. Bilurin vit royndarkoyrdu er væl útgjørdur við t.d. sentarllási við fjarstýring, ABS bremsum við EBD og BAS, elrútum, el-síðuspegl við hita, ið elektriskt kunnu leggjast inn móti bilinum, rattið kann stillast allar vegir, fløguspælara, multi informatiónsdisplay og ventileraðar skivubremsur við øll fýra hjólini. Bilurin kann verða útgjørdur við luksuspakka 1 ella luksuspakka 2. Luksuspakkarnir umfata t.d. heilautomatiskt klimaanlegg, cruise control, DVD-navigatiónsskipan og leðurintrekk fyri at nevna okkurt burtur úr rúgvuni av eykaútgerð. Bilurin er sum ein persónbilur at sita í og at koyra við. Munurin er bert, at tey ferðandi í bilinum sita høgt og hava gott útsýni.



*Nýggi Land Cruiser er designaður á evropeiska designsentirnum hjá Toyota í Suðurfraklandi*



*Land Cruiser innan. Sum ein persónbilur við alu-look panelum á instrumentborðinum*

### Toyota Land Cruiser 3,0 D-4D 3/h

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 3.0 litur 4 syl. diesel 163 hk commonrail v.turbo og intercooler |
| 0-100 km/t: | 12,7 sek. |
| Oljunýtsla: | 10,6 km/l |
| Dekkstødd: | 225/70-17 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 436,5 cm |
| Breidd: | 179,0 cm |
| Hædd: | 189,0 cm |
| Eginvekt: | 1850 kg |
| Prísur: | kr. 410.600 (vørubilur kr. 328.000,-) |
| Søluumboð: | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>353040<br>www.reyniservice.fo |